**EG MEINI TAÐ**

## Forundarliga lív ...



*Bergur Rasmussen skrivar:*

Í Evropa kjakast tey í hesum døgum um eina nýggja ES-grundlóg. Henda lóg kann fáa ómetaliga stóran týdning fyri okkum føroyingar, tí um danir góðtaka hana, so broytist okkara politiska støða avgerandi. — Antin mugu vit gera sum danir, ella mugu vit gera okkurt heilt annað. — Men tað skal sum so ikki vera evnið í hesum lítla stubba ...

Kortini átti komandi grundlógin hjá Evropa Samveldinum at havt okkara áhuga. Tí mikið klandur hevur tikið seg upp millum londini, sum annars eru samd um tað mesta: Tey vilja øll hava frían marknað; arbeiðsmegin skal kunna flyta frítt um landamørk; fleiri hava longu tikið við einum felags gjaldoyra; og tað verður tutlað í krókunum um at gera eitt felags Evropa her, so man hevur okkurt at markera seg við; um ikki yvir fyri amerikumonnum, so í øllum føri yvir fyri russum.

So tað er ikki har, hundurin liggur grivin.

Trupulleikin er Várharra. — Skal Gud nevnast í komandi grundlógini, ella skal Gud ikki nevnast? — Katólsku londini siga ja, tey protestantisku ivast. — Hvussu skal ein møgulig allýsing ljóða? Skulu profetarnir takast við? Skulu halgimennini? Skal tað standa "Eg eri", ella skulu tey skriva "Eg eri vegurin, sannleikin og lívið", ella hvussu við "Eg trúgvi á Gud faðir, skapara himins og jarðar ..." ... ?

Og hvussu við teimum mongu tilflytarunum, sum ikki bekenna seg til Hvíta Krist?

Tað er ein góður spurningur.

Kanska skuldu vit bjóða eini ES sendinevnd henda vegin, tí vit kundu kanska lært evropeararnar bæði eitt og annað, um teologiskar spurningar. Tað finst valla nakað land inni á meginlandinum, har tey kjakast líka dúgliga um teir andaligu spurningarnar, sum hjá okkum. Longu í barnaskúlanum kjakast uppvaksandi ættarliðini um sítt samband uppeftir, og kjakast verður uttan íhald.

Í Føroyum munnu tey fægstu ivast í, at Várharra skal nevnast í einari møguligari grundlóg, hvat enn hon endar sum ein samveldissáttmáli, ella um hon proklamerar republikkina.

Og við slíkum kjølfesti var tað bara ein spurningur um tíð, áðrenn tey fyrstu kristnu uppdagaðu sítt politiska potentiali. — Og tað gjørdu tey fyri gott tjúgu árum síðani.

Men hóast tey í einari handavending fingu forbjóðað ávísum bløðum og tíðarritum eftir reglunum um ósømiligheit, so gongur heldur striltið við "tí totala avhaldinum" fyri at sitera burturúr bók hjá William Heinesen. Tí føroyingar eru, sum flest øll onnur fólk um okkara leiðir, farnir at tosa meiri frítt um gomlu tabuevnini.

Ja, fyri tíðina kappast bløðini beinleiðis við saftigum greinum um eitt parforhold fyri opnum skíggja millum ein VÆLvaksnan danskara, sum vigar trísiffrað og eina trúgvandi føroyska gentu, sum ikki smæðist við at viðganga, at hon hevur lagt sær skúm inn í boppurnar. Tað er jú mannasøgn, at Robert kysti ein sissal og fekk føroysku kiskuna við sær í boblubað. Og feminima fregnartænastan vil vera við, at hesin Grand Daois brúkar vulkaniserað gummi í støddini XXL, sum miðalhampamaðurin her á landi einans kann gera sær vónir um at fáa við umfatandi skurðviðgerðum ella vakumpumpu. — Sjálvandi kann hann so bara góðtaka natúru sína og fara á burgerbarr ella á vertshús at fáa passandi støddina, ið til endans førir til tey trý so vælkendu tje'ini við tí føroyska manninum: Tjúkkur, tjeðiligur, tjenning ...

Lat so spurningarnar, um tað skal vera loyvt tingfólki at kalla onnur nazistar, ella um ein ráðharri fyri trivnaði sleppur at sláa sosialar trupulleikar upp í glens, ella um flotin kann loyva sær at flagga út við teirri grundgeving at føroyskir sjómenn eru ov dýrir.

Vit finna nokk eina loysn, tá ið nýggja ES grundlógin kemur, ella finnur onkur hana helst fyri okkum. — Og tað er so deiliga sissandi.

Á, dett forundarliga lív ...

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 341800, telefax 341801,
teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro



# Bravo Føroya Symfoniorkestur!





**UMMÆLI**

*Sunleif Rasmussen*

Tað var gleðiligt at síggja, at so nógv fólk høvdu leitað sær niðan í Norðurlandahúsið síðsta sunnudag at lurta eftir Føroya Symfoniorkestri. Gleðiligt, serliga tí konsertin var á so høgum støði. Havi ikki hoyrt so nógvar konsertir við orkestrinum seinnu árini, men fólk, ið hava hoyrt flestu konsertinar, vildu vera við, at hetta var tann besta nakrantíð. 5. symfoni eftir Tjajkovskij og Klaverkonsert nr. 2 eftir Sjostakovitj á somu konsert er ikki hvørsmansføri.

Tjajkovskij er størsta romantiska tónaskald russa. Hansara symfoniir eru sera nógv spældar í dag, men tað var sannilga ikki so, tá ið tónaskaldið livdi. 5. symfoni var serliga illa lýdd í fyrstani. Tað er torført at skilja í dag, nú hendan helst er mest spælda symfoniin hjá Tjajkovskij.

Symfoniin byrjar við einum motivi við homofonum fylgispæli. Hetta motiv fer ígjøgnum nógvar og umfatandi broytingar. Tað er syrgið í moll og heroiskt í dur. Tað valsar. Tað er við øðrum orðum ílatið alskyns klæði. Fylgisveinar eru bæði statisk homofoni og leikandi polyfoni.

Tónaskøld á norðaru hálvkúlu hava eina serliga trongd og evni at skapa myrkar klangir, og er Tjajkovskij einki undantak í somáta. Fyri at fáa myrka tónan fram nýtir Tjajkovskij tey vælkendu amboðini so sum strúkarar, ið spæla á teimum djúpu streingjunum, og djúpar messingklangir. Men romantisk tónaskøld, eitt nú Schumann, Mahler, Sibelius og Tjajkovskij, nýttu eisini tvær klarinettir, ið spæla unisont í tí lága tónalagnum. Hetta gyklar fram ein sera melankolskan klang. Skal hetta eydnast, krevur tað sera góðar tónleikarar. Í støðum, har spælt var piano, komu klarinettspælararnir væl frá sínum leikluti, men tá ið spælt varð forte fór intonatiónin eitt sindur út av lagi.

Páll Sólstein spældi stóru hornsoloina í 2. satsi sera væl. Hann hevði skilt hvønn einstakan tóna, og fekk alt tað burturúr nótunum, sum tónaskaldið hevur ætlað. Vit eiga nógvar framúr tónleikarar, ið virka uttanlands. Stutttligt hevði verið at hoyrt Annu Klett spælt við á slíkari konsert. Týdningarmikið er at nýta tað besta vit eiga, og harímillum telist hon saman við øðrum.

Síggja vit burtur frá nøkrum fáum lýtum, kom orkestrið sum heild sera væl frá hesum megnarverki. Tó skaraðu messingblásararnir framúr.

Klaverkonsert nr. 2 eftir Sjostakovitj er eitt sera lætt og ikki sørt ungdómskent verk. Kanska tí, at konsertin er skrivað til endaligu prógvtøkuna hjá 19 ára gamla soni hansara á konservatoriinum í Moskva.

Jóhannes Andreasen var solistur, og var hetta ein framúr góð framførsla. Sera góð rútmukensla í 1. og 3. satsi. Hóast orkestrið haltaði eitt sindur í 7/8 parts rútmuni í 3. satsi, nervaðist spælið hjá Jóhannes ikki av hesum. Fleiri av tónleikarunum hava helst ongantíð spælt 7/8 part rútmu áður.

2. satsur er sera lýriskur. Her fekk Jóhannes ein magiskan stemning fram, við síni stóru kenslu fyri klangi. Hetta hevur hann víst so ofta áður. Serliga legði ein merki til, at hann hevði lært seg konsertina uttanat. Helst út frá tankanum um at nótar er eitt amboð til innlæring. Tá ið ein hevur lært alt uttanat, kann arbeiðið við tónleikinum, og byrja av álvara. Tó hevði Jóhannes bert knapt tveir mánaðar at læra konsertina. Til hetta arbeiðið nýta solistar úti í stóru verð millum eitt og tvey ár. Hetta sigur nógv um umstøðurnar hjá tónleikarum her heima, ið vilja vera verandi á høgum listarligum støði. Tað er alskurin til tónleikin, ið drívur verkið. Jóhannes hevur stóra tøkk uppiborna fyri stríðið. Úrslitið var ein fragd fyri oyrað.

Tað eru nógvar umstøður, ið skulu vera til staðar fyri at skapa eina góða konsert. Ein treyt er ein góður orkesturleiðari. Ein góður orkesturleiðari skal duga væl at leggja venjingarætlan til rættis. Hann skal hava drívmegi, karisma og duga at sláa takt. Tað síðsta er tað einasta hann kann læra. Allar hesar eginleikar hevur Bernharður Wilkinson. Bernharður dugir sera væl at fáa tónleikin at liva og anda. Tað eydnaðist honum eisini væl at fáa Jóhannes at spæla frítt, og fáa orkestrið at fylgja solistinum. Hetta sýntist lætt, men er tó sera torført. Hansara drívmegi og karisma hoyrist aftur í spælinum. Hann fekk orkestrið til meira enn bert at spæla nótarnar. Hann fekk tey at "spæla tónleik".

Tað stóð í skránni, at Bernharður bert var komin til Føroya í eina tíð. Vónandi verður henda tíðin long, og vónandi fer Bernharður Wilkinson at verða tætt knýttur at Føroya Symfoniorkestri í framtíðini.

**Ouvertura: Sjostakovitj**
**Klaverkonsert nr. 2: Sjostakovitj**
**Symfoni nr. 5: Tjajkovskij**

**Solistur: Jóhannes Andreasen**
**Orkesturleiðari: Bernharður Wilkinson**

